# ítróttur

Nr. 23 • mikudagur • 1. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# – Eg eri útbrendur sum formaður

**Tað kom óvart á fólk í HB, at formaðurin seinastu fimm árini týskvøldið takkaði fyri seg. Birgir Enghamar sigur, at tíðin hevur verið sera spennandi og lærurík, men nú er hann útbrendur av uppgávuni sum formaður**


FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*





*Sum forma›ur hevur Birgir Enghamar veri› vi› til at tiki› onkrar drastiskar avger›ir. Men sjálvur heldur hann, at ítróttarligu úrslitini hava prógva›, at hesar hava veri› rættar*

Týskvøldð vóru aðalfundir í Havnar Bóltfelag og P/F Havnar Fótbólti, og formaðurin í hesum báðum feløgum segði seg frá á aðalfundunum.

Birgir Enghamar hevur verið formaður í HB seinastu fimm árini, og nú helt hann, at tað var nóg mikið.

– Eg havi hugsað um mína støðu í langa tíð, og tá ið tú fært slíkar tankar um at gevast, sum eg havi havt í vetur, so er best at steðga. Uppgávan sum formaður er sera strævin, og nú eri eg útbrendur í hesum leiklutinum, sigur Birgir Enghamar.

– Orsøkin til, at eg ikki havi boðað frá hesum áður er, at eg havi havt trupult við at taka endaliga avgerðina, men nú er hon tikin.

### Góð ár ítróttarliga

Tíðin sum formaður í stóra høvuðsstaðarfelagnum hevur verið sera hendingarrík. HB hevur staðið seg sera væl í fremstu mansdeildini hesi árini, og trý meistaraheiti á rað var eitt óvanligt avrik.

– Árini hava verið sera góð, og ikki minst 2004 var serliga gott ítróttarliga. Tá fylti HB 100 ár, og vit gjørdust mest vinnandi felagið í landinum, sigur Birgir Enghamar.

– Tað hevur eisini verið spennandi at samskift við nógvar markantar persónar og hava roynt at fingið at ganga væl. Vit eru ikki altíð samd um alt í einum felag sum HB, men vit hava dugað sera væl at loyst alt innanhýsis í felagnum, og tað fegnist eg um, sigur hann.

### Drastiskar avgerðir

Tað hava eisini verið onkur tíðarskeið, sum hava verið meira turbulent, og tveir høvuðsvenjarar eru sagdir úr starvi hesi árini.

– Eg havi verið við til at tikið nakrar drastiskar avgerðir, og tað er trupult at siga, um vit gjørdu tað rætta. Men ítróttarligu úrslitini haldi eg vísa, at tað var í øllum førum ikki skeivt, sigur hann.

Birgir Enghamar ætlar sær at taka frí frá HB eina tíð, men hann avvísir ikki, at hann tekur onkra uppgávu á seg fyri felagið aftur.

– Hjartað verður framhaldandi reytt og svart. Fyri fyrst havi eg brúk fyri at hvíla meg eitt sindur frá felagnum, men vit fáa at síggja, hvussu tað verður við mínum leikluti í felagnum, sigur hann.

## Fimm kunnu gerast formenn

Fimm mans hava møguleikan at gerast nýggjur formaður í HB, eftir nevndarvalið týskvøldið. Umframt formannin legði eisini varaformaðurin seinnu árini, Jan Falkenberg Jensen, frá sær. Nýggir í nevndini eru Johnny Gaard, Bent Tommy Linklett og Gunnar Mohr, ið er tiltakslimur. Sambært heimasíðuni hjá HB eru fimm mans, sum kunnu gerast nýggjur formaður: Niels Juel Arge, Finn Ludvig, Johnny Gaard, Helgi Nielsen ella Teitur Johannesen

# Elspa varð heiðrað

Svimjarin Elspa Mørkøre varð týskvøldið heiðrað fyri av hava framt »Ársins ítróttarbragd«. Lítil móttøka varð fyri henni og hennara nærmastu á býráðsskrivstovuni í Gøtu, og har helt Páll Isholm, borgarstjóri, røðu fyri henni. Hann fegnaðist um, at ung gøtufólk gera vart við seg uttanlands. Hann helt orsøkina vera at tey leita fram møgulleikarnar heldur enn at síggja foringarnar, hóast umstøðurnar ikki altíð eru sum man kann ynskja sær.

Oluffa Hammer, leiðari fyri Føroya Sparikassa í Gøtu, handaði Elspu eina peningagávu.

– Ítróttarfólk eru hetjurnar í okkara tíð – tey, sum við góðum úrslitum og stundum við veruligum brøgdum vísa okkum, at tað loysir seg at stríðast og at berjast fyri einari søk, segði Oluffa í sínari røðu.




*Elspa Mørkøre var heiðrað í Gøtu týskvøldið*

## Start uttan Toda

Norska felagið Start vann týskvøldið venjingardyst ímóti svenska felagnum IFK Gøteborg. Dysturin varð spældur á La Manga, og Start vann 4-3. Todi Jónsson var ikki við í dystinum, tí hann hevur ein skaða. Start er illa plágað av skaðum, tí heili 11 spælarar eru ikki førir fyri at spæla dyst í løtuni.

**ek**

## Fóru við liðfelaga hjá Símuni

Í gjár gjørdi danska superligafelagið Silkeborg sáttmála við íslendska spælaran Hørður Sveinsson, og harvið misti føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen ein liðfelaga hjá sær. 22 ára gamli Hørður Sveinsson hevur spælt fyri Keflavik, og hann ivaleyst verður saknaður, tí í fjør gjørdi hann 16 mál í 24 dystum fyri felagið. Hørður hevur eisini áður spælt fyri ymisk íslendsk ungdómslandslið.

**ek**

## HB-kvinnur eru í gongd

HB fer aftur í hesum kappingarárinum at manna kvinnulið, og nú er venjingin hjá kvinnuliðnum komin í gongd – í fyrstu syftu innandura. Heimasíðan hjá HB skrivar, at upp í 18 kvinnur hava verið til venjingar okkurt kvøldið. Tað eru tvey ár liðin, síðani HB tók sítt lið úr kappingini orsaka av lítlari undirtøku, men nú er støðan betur, verður sagt. Andras K. Thomassen er venjari hjá HB-kvinnunum. Fyrsta styrkisroyndi hjá HB-kvinnunum verður 13. apríl, tá ið tær spæla steypadyst ímóti AB.

**ek**

## Claus á beinkinum

Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá ið Coventry týskvøldið vann 2-1 á Hull City í næstbestu ensku deildini. Nýggi spælarin í felagnum, Dennis Wise, var við á liðnum hjá Coventry, og millum annað tí var ikki pláss til Claus millum teir 11 útvaldu. Wise skoraði annað av málinum hjá Coventry, sum spælir aftur um vikuskiftið – tá stendur Brighton fyri tørni.

**ek**